# Starv innan kredittmeting

Søkt verður eftir starvsfólki til kredittdeild okkara

**Uppgávurnar eru:**
- ráðgeving innan kredittøkið til allar deildir v.m.
- útinnan av kredittmetingum; vinnuligt og privat
- roknskaparsundurgreiningar
- lýsing av vinnugreinum
- hagtalsuppgávur
- ad-hoc uppgávur

**Førleikakrøv:**
- HA, HD, Bachelor ella aðra viðkomandi útbúgving
- kunnleika til EDV
- duga at málbera seg í skrift og talu

**Persónligir eginleikar:**
- duga at arbeiða sjálvstøðugt
- vera fyrikomandi og hava góð samstarvsevni

Starvsstaður er Tórshavn. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Boga Bendtsen, undirstjóra, tel. 348 000.

Løn og eftirløn verða ásett eftir nærri avtalu.

Umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal verða Føroya Sparikassa í hendi í seinasta lagi 18. mai 2001, og sendast til:

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
Kredittdeildin,Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn
E-post: kredittdeildin@sparikassin.fo www.sparikassin.fo

Arbeiðsøkið hjá kredittdeildini fevnir m.a. um ráðgeving av deildum Sparikassans, kredittmeting, vinnugreinalýsingar, uppfylging, roknskapar-, hagtals- og aðrar uppgávur. Í løtuni starvast 8 starvsfólk á kredittdeildini.



zarepta -2001

## Tekningarseðil til familjulegurnar

Um Gud vil, er ætlanin aftur í ár at hava familjulegur í Zarepta í Vatnsoyrum.

Av tí, at pláss bert er fyri 25 familjum á hvørji legu, er møguleiki at hava tvey ynski á tekningarlistanum.

Eru ivaspurningar, ber til at ringja til Ragnfríð Kannuberg, tlf. 447708.

Fyllið seðilin út sum skjótast, og tit frætta aftur í góðari tíð.

**Tekningarseðilin skal sendast til: Ragnfríð Kannuberg, Postboks 201, 600 Saltangará.**

| | Familjulegur 2001 | Ynski 1 | Ynski 2 |
|---|---|---|---|
| Familjulega I | Leyg. 26.05.–Fríg. 01.06. | | |
| Familjulega II | Leyg. 02.06.–Fríg. 08.06. | *FULLTEKNAÐ* | |
| Familjulega III | Leyg. 09.06.–Fríg. 15.06. | *FULLTEKNAÐ* | |
| Familjulega IV | Leyg. 16.06.–Fríg. 22.06. | | |
| Familjulega V | Sun. 19.08.–Leyg. 25.08. | | |

Navn/Nøvn á foreldrum:

Tlf.: Gøta: Bygd/býur:

Navn og aldur á børnum:

Viðmerkingar:

Felagið fyri Skrivstovu- kramba- og teknisk starvsfólk

**Upplýsir um:**
- sáttmálan
- starvsmannalógina
- frítíðarlógina o.a.

**Gerist limir - so standa vit sterkari!**

Tlf 316837 og 216837
Traðarvegur 20
Boks 1378
110 Tórshavn
skfelag@post.olivant.fo

Opið er soleiðis:
Mánadag - fríggjadag
9.00 - 12.00
13.00 - 16.00

VOLVO RENAULT

# Bilmekanikari

Vegna økt virksemi, verður søkt eftir røskum sveini til persónbilaverkstað okkara, at byrja skjótast til ber.

Verkstaður okkara eru autoriseraður VOLVO & RENAULT verkstaður við tilhoyrandi sproytukabinu.

Ynskir tú at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at tosa við Jóhann Wolles, verkførara, ella við stjóran, Sverra Steintún.

VR BILAR
**VR-BILAR**
Hoyviksvegur 61
Box 3130
FO-110 Tórshavn
Tlf. 322110



## Evangelisk møtir í Suðuroy við Orla Lindskov Christensen

**9.–11. mai 2001**

**Mikukvøldið 09. mai kl. 20: Møti í skúlahøllini í Trongisvági**
**Hóskvøldið 10. mai kl. 20: Møti í skúlahøllini í Trongisvági**
**Fríggjakvøldið 11. mai kl. 20: Møti í skúlahøllini í Porkeri**

Í Danmark er Orla mest kendur fyri, at mong er blivin grødd á møtum hansara. Eisini í Føroyum hevur Orla prædikað evangeliið.
Fyrr í ár stóð grein í Dimmalætting um tá hann bað fyri smágentu í Skopun, sum var fødd deyv, men sum fekk hoyrnina í somu løtu Orla bað fyri henni.

*Øll eru hjartaliga vælkomin*

**Evangeliska samtakið KARISMA**



# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir pleygufamilju til 14 ára gamlan drong.

Pleygufamiljan verður at virka fyri eini á allan hátt tryggari og mennandi tilveru fyri drongin.

Ynskiligt er, at tann/tey, ið sett verða, hava hóskandi fakliga útbúgving og royndir innan mennandi arbeiði við børnum/ungum.

Arbeiðið verður skipað í samráð við avvarðandi barnaverndarnevnd og Almannastovuna við møguleika fyri regluligari ráð- og vegleiðing.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært galdandi reglum.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19.05.2001 og skulu stílast til:

**Almannastovan**
Suðuroyar deild
att. Eliesar Jacobsen, sosialráðgevi
800 Tvøroyri

Nærri upplýsingar um starvið fáast á tlf. 371620 lokal 12 hjá Eliesar Jacobsen og 315480 lokal 141 Sigrun Bærentsen.

# Pleygufamilja

Søkt verður eftir stuðulsfólki til eina familju í Suðuroy.

Málið við stuðlinum er at menna samskifti í familjuni, eins og at virka fyri eini tryggari og mennandi tilveru.

Arbeiðstíðin verður skipað í samráð við familju og avvarðandi myndugleikar og verður í mesta lagi 13 tímar um vikuna.

Stuðulin er fyribils játtaður í eitt hálvt ár.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 19.05.2001 og skulu stílast til:

**Almannastovan**
Att. Hallbjørg Lamhauge, sosialráðgevi
Postboks 3096
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fáast á tlf. nr. 315480 lokal 126 hjá Hallbjørg Lamhauge og lokal 141 hjá Sigrun Bærentsen.

# Pedagogar til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir 2 pedagogum til Dagstovnin á Argjum frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu. Størvini eru á vøggustovu ávikavist 35 og 40 tímar um vikuna.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvsognarstovnur. Á stovninum ganga 72 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk.

Á stovninum eru fýra barnagarðsstovur og tvær vøggustovur, har tann eina barnagarðsstovan er samskipað serstova við deyvum/tunghoyrdum og hoyrandi børnum. Á hvørjari stovu ganga 12 børn.

Vit ynskja, at tú saman við okkum skapar eitt umhvørvi fyri børnunum, har tey kunnu trívast og mennast. Somuleiðis, at tú er nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti at víðariútvikling av hesum.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kanst tú seta teg í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara á tlf. 319019, lokal 10.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 28. mai 2001.

# Arbeiðsmenn

Søkt verður eftir tveimum arbeiðsmonnum til arbeiði í Havn.

**Tlf. 421643 ella 211643**

# KUNNGERÐ
## um fyribils bussrutu Kambsdal-Fuglafjørður

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at Fuglafjarðar býráð á fundi tann 24. apríl 2001 hevur samtykt at fara undir royndarkoyring við ferðafólki millum Kambsdal og Fuglafjørð í eini fyribils royndartíð upp á 2 mánaðar.

Koyringin byrjar mánadagin tann 07. mai og heldur fyribils fram til fríggjadagin tann 06. juli 2001, og koyrt verður mánadag-fríggjadag hesar tíðir:

| Av Kambsdali: | Úr Fuglafirði: |
|---|---|
| Kl. 07.40 | Kl. 08.10 |
| Kl. 09.30 | Kl. 10.40 |
| Kl. 12.00 | Kl. 12.30 |
| Kl. 14.00 | Kl. 14.30 |
| Kl. 14.50 | Kl. 15.25 |
| Kl. 15.40 | Kl. 16.00 |
| Kl. 16.30 | Kl. 17.45 |
| Kl. 18.30 | Kl. 18.45 |
| Kl. 19.30 | Kl. 20.00 |
| Kl. 20.30 | Kl. 21.00 |

Bussurin steðgar í Fuglafirði oman fyri skúlan, við Keypssamtøkuna og við skýlið við Føroya Banka og við handilin hjá Haraldsen. Á Kambsdali verður steðgað við húsini hjá Pætur Martin Hansen, við bussskýlið og við miðnámsskúlarnar.

Einvegiskostnaðurin fyri vaksin verður kr. 10,00 og fyri børn kr. 5,00. Næmingar, sum skulu hava flutning til og frá skúlunum í kommununi, koyra ókeypis.

*Fuglafjørður, tann 01. mai 2001*

**Fuglafjarðar býráð**

# Aðalfundur

Foreldrafelagið Hoyrnin fyri deyv og tunghoyrd børn hevur aðalfund leygardagin 19. mai kl. 15.00 í Deyvahúsinum.

Skrá sambært viðtøkum.

**Nevndin**

# Føroya Studentaskúli og HF-skeið

**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Frá 1. aug. 2001 er eitt fast starv leyst at søkja í lærugreinini

**føroyskum**

Umsøkjarar verða bidnir um at upplýsa, hvørjari aðrari lærugrein teir hava undirvísingarførleika í.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðubløði frá YF verður stílað til Mentamálastýrið, Tórshavn, men verður sent rektaranum: **Mads A. Winther, Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar, FO-188 Hoyvík.**

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hend í seinasta lagi 8. mai 2001.

# Havna-umsjónarmaður til Vágs Havn

Vegna ov fáar umsóknir, verður umsóknarfreistin til starvið sum havnaumsjónarmaður við Vágs Havn longd tann 25. mai 2001.

Umsøkjarin skal hava nautiska útbúgving, skal kunna arbeiða við teldum og tosa og skriva enskt.

Løn samb. sáttmála millum Starvsmannafelagið og Vágs Kommunu.

Umsóknir við prógvum og ummælum skulu vera Havnanevndini í hendi í seinasta lagi 25. mai 2001.

**Vágs Kommuna - Havnanevndin**
FO-900 Vágur